

*Chevron er sera væl nøgt við arbeiðið hjá Atlantsflogi. Her tyrlan eftir manning á seismikkskipi*
*Mynd Chevron*



*Transocean Rather skal bora tríggjar avmarkingarbrunnar fyri Chevron samtak næsta ár*

## Chevron dregur onnur við sær

Tað er annars áhugavert at bíta merki í, at rættiliga ókend feløg um okkara leiðir, royna at knýta seg í loyvini, sum Chevron er fyristøðufelag fyri. Tað er líkasum, at tey hava álit á tað arbeiði, sum Chevron hevur gjørt og tí eru tey ikki bangin fyri at "farma" inn tvs. keypa seg inn í loyvi hjá Chevron. Eitt tílíkt felag er danska Mærsk Olie og Gas. Hetta er ein gamal kenningur á Føroyaøkinum men tó bert í byrjanini av leitiævintýrinum. Mærsk tók seg eftir eina tíð heilt úr øllum hesum økinum fyri so at vísa seg aftur við fullari styrki nógv ár seinni. Fyrr í ár gjørdi felagið av at keypa seg inn í eitt loyvi hjá Chevron beint við markið, og í seinastu útbjóðingini í bretskum øki hevur Mærsk fingið tillutað fleiri áhugaverd loyvi eisini beint við føroyska markið. So okkurt er, sum bendir á, at hetta annars varna danska oljufelagið, nú av álvara er farið at vísa Atlantsmótinum ans. Og neyvan er tað skeivt at gita, at ein orsøkin til hetta eru stóru fyrireikingarnar og kanningarnar hjá Chevron. Á ein hátt kann man tí siga, at Chevron við at trúgva uppá og halda seg fast um sína strategi á Atlantsmótinum er við til at hála fleiri onnur oljufeløg við sær. Og hetta er sjálvandi nakað, sum kann gagna leitingini við Føroyar og longu hevur gjørt tað.

Samstarv millum Chevron og Statoil í bretskum øki hevur eisini borið frukt, soleiðis at hesi bæði feløgini nú eru drívmegin á okkara landgrunni. Eisini hevur hetta samstarv drigið við stóra eysturtýska oljufelagið OMV. Og spurningurin er bara, hvørji feløg aftrat, sum Chevron og Statoil fara at draga inn á føroyaøkið. Kanska tað næsta verður Mærsk. Seamus Reilly vil helst ikki gera viðmerkingar um onnur oljufeløg, men hann er fegin um, at eitt felag sum Mærsk eisini vísir Atlantsmótinum ans. Tað kann bara vera ein styrki fyri gongdina.

## Statoil og Chevron

Nú Satoil varð so heppið ella so mikið framsíggið at keypa seg inn í loyvið hjá Chevron, beint áðrenn Rosebankfundurin varð gjørdur spurdu vit Seamus, hvat hann heldur um hetta stigið hjá Statoil?

- Eg gangi út frá, at teir hava gjørt sítt heimaarbeiði og kunnað seg væl um økið, áðrenn teir farmaðu inn. Í dag kunnu vit siga, at hetta var eitt skilagott stig teir tóku. Vit eru sera fegnir um at hava Statoil sum partnarar.

ChevronTexaco var annars tað fyrsta felagið, sum í heila takið boraði á bretskum øki og felagið er eisini sera virkið í danska partinum av Norðsjónum. So søguliga sæð hevur felagið djúpar røtur í hesum partinum av verðini, og tí er ikki rætt heldur at tosa um Chevron sum eitt amerikanskt felag. – Vit eru eitt europeiskt skrásett felag, og nógvir av okkara serfrøðingum eru úr europeiskum londum sigur ein avgjørdur Seamus Reilly.



*Western Geco hevur staðið fyri einum stórum seismiskum arbeiði fyri Chevron á Føroyaleiðini í summar. Her verður brúkt mest framkoman útgerðin, sum finst*
*Mynd Chevron*